

# Ert tú tann persónurin, sum skal leiða Klaksvíkar Havn inn í framtíðina...

**Stórar og spennandi útbyggingar geva Klaksvíkar Havn nýggjar menningar- og inntøkumøguleikar, og nú er avbjóðingin at gagnnýta nýggju karmarnar best møguliga, samstundis sum Klaksvíkar Havn verður at menna og nútímansgera seg á øllum mótum.**

***Høvuðsuppgávur havnastjórans verða***, við tilvísing til havnanevndina og í samstarvi við býráðsumsitingina:

- at hava ovastu umsitingarligu ábyrgd
- at stjórna og skipa arbeiðið
- at menna og selja Klaksvíkar Havn
- at mynda havnina, inneftir og úteftir
- at leggja framtíðar ætlanir

***Førleikar og eginleikar, sum serliga verður sóknast eftir:***

- leiðslu- og samstarvsroyndir og –eginleikar
- evnir at brúka persónligar eginleikar og royndir til at seta ting í verk og at fylgja teimum upp
- viðkomandi útbúgving – gjarna hægri útbúgving
- góður kunnleiki til føroyskt, skandinaviskt og enskt mál
- góður skrivligur førleiki
- roknskaparkunnleiki og fatan

***Lønar- og setanartreytir*** sambært sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Starvið verður at seta skjótast tilber.

***Umsóknin verður at senda til:***
Klaksvíkar Kommunu
Postboks 2
700 Klaksvík

og skal verða okkum í hendi **í seinasta lagi fríggjadagin 18. juni** 2008 klokkan 12:00.

***Fleiri upplýsingar:***
Um starvið kunnu fáast við at venda sær til Hera M. Hammer, býarverkfrøðing, ella John Færø, býráðsskrivara, á tlf. 41 00 00, ella teldupostadressu: klaksvik@klaksvik.fo.

## *Klaksvíkar Havn*



Klaksvíkar Kommuna I Nólsoyar Pálsgøta 32 I FO-700 Klaksvík
Tel. 410000 I Fax. 410001 I klaksvik@klaksvik.fo I www.klaksvik.fo